## Jóansøka: Nógv fólk og góður hýrur

*Løgreglan í Suðuroy slapp at halda Jóansøku í friði og náðum. – Gestirnir vóru komnir til Suðuroyar at halda Jóansøku, og ikki at berjast, sigur vakthavandi á støðini á Tvøroyri*

Sveinur Tróndarson

Jóansøkan var í Vági um vikuskiftið, og sum vanligt var nógv fólk á stevnu. Veðrið var fyrireikarunum til vildar, men tað vóru nú ikki bara fyrireikararnir, sum fingu gagn av góðveðrinum. Løgreglan kann eisini fegnast um, at stevnuhýrurin fylgdi veðrinum, og tí kundu teir njóta stevnuna í friði og náðum.

Vakthavandi á støðini á Tvøroyri sigur, at hetta var ein av teimum allarfriðarligastu jóansøkunum. – Vit hava ikki havt so mikið sum ein liggjandi gest og tað er ikki so vanligt, sigur vakthavandi. Trý fólk vóru tikin fyri at koyra við kenning, og tað var í stuttum tað, sum hendi á Jóansøku, leggur vakthavandi afturat.

Tað talar sjálvandi ímóti at hava liggjandi gestir, at løgreglan heldur til á Tvøroyri og í ár var stevnan í Vági. – Ikki tí at tað ikki ber til, men tað er sjálvandi ikki so høgligt, at fara dragandi við teimum úr Vági á Tvøroyri. Men soleiðis eru umstøðurnar nú einaferð, og í ár, sluppu vit frá, at hugsa nakað sum helst um tað, tí eingin var, sum skuldi inn at sova, sigur vakthavandi.

Løgreglustøð var í Vági til fyri nøkrum árum síðani, og hon var rættiliga jóansøkuútgjørd, um vit loyva okkum at kalla tað so. Klivar og alt tað, sum hoyrir til eina slíka støð, og tað gjørdi arbeiðsumstøðurnar hjá løgregluni í Suðuroynni munandi lættari. – Men nú er tað sum tað er, og vit klára okkum, sigur vakthavandi á støðini á Tvøroyri.

Løgreglan á Tvøroyri hevði annars gjørt seg út til Jóansøkuna. Tað eru sjey mans knýttir at støðini, harav ein er sýslumaður og tveir eykamenn. Umframt teir vóru tríggjar mans komnir suður um fjørðin, so alt í alt vóru tíggju mans til arbeiðis um jóansøkuna.

# Limatalið hjá Starvsmannafelagnum vaks í stórum

*Leygardagin gerast allir teir 238 limirnir í Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag limir Starvsmannafelagsins.*

Eirikur Lindenskov

110 og teimum 114 limunum, sum møttu á fundi hjá Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag atkvøddu fyri at leggja felagið saman við Starvsmannafelagnum - og harvið taka felagið av. Tveir limir atkvøddu ímóti og tveir atkvøddu blankt.

Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag, ið umboðar starvsfólk hjá Tórshavnar, taldi, nú tað var lagt niður, 238 limir

Samanleggingin merkir, at limir í Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag frá 1. juli 2000 verða limir í Starvsmannafelagnum við fullum limarættindum og limaskyldum. Hetta merkir, at hesi eisini eru umfatað av lógum og reglugerðum Starvsmannafelagsins og hava somu tryggingar- og eftirlønarskipan.

Hinvegin er núverandi nevnd Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelags framvegis bundin av sáttmálanum við Tórshavnar kommunu til hesin gongur út, og fer sitandi nevnd at taka sær av praktiska arbeiðnum hesum viðvíkjandi, eins og higartil, sigur formaður felagsins, Kartni Ravnsfjall.

Tórshavnar Kommuna fer eisini framyvir at vera sjálvstøðugt sáttmálaøki, og verð tað umboð fyri bæði Starvsmannafelagið og verandi nevnd í Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag, ið fara at standa fyri sáttmálasamráðingunum komandi ár. Verandi nevnd Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelags verður sostatt sitandi til sáttmálaskeiðið er liðugt 1. juni 2001.



*Kartni Ravnsfjall, seinasti formaður í TKST*

Høvuðsgrundgevingin fyri samanlegging er, at møguleikin fyri at betra um kor starvsfólksins er størri, sum partur av Starvsmannafelagnum.

– Starvsmannafelagið er helst sterkasta fakfelag í landinum,og við limum Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelags, verður tað enn størri og sterkari.

– Tíðin var búgvin til broytingar, men er tað tó við ikki sørt sorgblídni, at avgerðin er tikin. Ein avgerð, ið samstundis merkir at felagið, ið skjótt rundar tey hálvthundrað - stovnað 7. nov. 1952 - verður tikið av. Men fyrst og fremst fegnast nevndin og nýggju limir Starvsmannafelagsins um tað stóru undirtøku, uppskotið fekk, og síggja vit fram til at virka undir hesum felag, sigur Kartni Ravnsfjall.

Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn segði við útvarpið í gjár, at Tórshavnar kommuna virðir fakfelagsrættin.

– Tá limirnir hava valt at gerast limir í Starvsmannafelagnum, og virða vit eisini ta avgerðina, segði hann.

## Minningarorð um Florensu Hammer

Florensa Hammer, vanliga nevnd Flora, varð fødd í Hørg í Sumba tann 3. mai 1915, og hon doyði tann 9. juni 2000 á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Hon var einsamøll systir millum átta brøður. Mentað systkin, sum hava sett síni spor í Føroya søgu.

Flora var abbasystir mín. Hon og maður hennara, Mortan Hammer, sáli, vóru barnleys, so tá eg var óviti, var tað ein sjálvsagdur lutur, at vit, »havnarbørnini«, fóru suður til Froðbiara at vitja – eins og móðir mín og hennara systkin gjørdu, tá tey vóru børn. Ja, Flora og Mortan vistu ikki alt tað góða, tey vildu gera fyri okkum. Ættarlið fyri ættarlið. Sama gestablídni vístu tey einum og hvørjum, ið kom á gátt hjá teimum á Torvheyggi. Hon var eisini besti kokkurin í familjuni, so tað var ógjørligt at tapa seg, tá ein gisti hjá teimum.

Flora var sera væl lýdd millum manna. Hon var vinsæl móti øllum og hevði altíð okkurt gott at siga við hin einstaka – í gerandisdegnum sum í veitslulagi. Eg trúgvi, at vit eru nógvir dreingir í familjuni, sum hava fingið somu áminning frá Floru: »Halt teg til Jesuspápan, men langt burtur frá fløskuni«. Rætt hevði hon.

Flora fylgdi til tað seinasta væl við í samfelagslívinum, segði sína meinig uppá sín sjarmerandi máta, og hon hevði dirvi at standa við sítt. Henni dámdi væl at arga, men tað var ongantíð illa meint. Hon kundi bara ikki lata vera – tað er vistnokk okkara familjueginleiki.

Flora var systir Pól F, og tað lá sera væl fyri hjá henni at yrkja. Somu evni hevði Mortan, og óteljandi eru tær veitslur, tey bæði hava skrivað sangir til.

Mínir tankar leita heim til familju og vinir hjá Floru. Eingin nevnd(ur), eingin gloymd(ur). Ja, serliga tómt følist tað hjá tykkum, sum dagliga vóru saman við henni. Ja, Harrin styrki okkum øll, ið syrgja.

Ærað veri minnið um Florensu Hammer.

**Ingemar Djurhuus, Århus**

# Stórur tørvur á maskinmeistarum

*Maskinmeistarafelagið tekur undir við Vinnuhúsinum, sum sigur, at tað eru ov fáir útbúnir maskinmeistarar í landinum. – Tað er ringt nú, og tá oljan kemur verður uppaftur verri, sigur felagið*

Sveinur Tróndarson

Fyri eini tíð síðani staðfesti Vinnuhúsið á teirra heimasíðu, at tað er trot á útbúnum maskinmeistarum. Trupult er bæði hjá virkjum og hjá skipum at fáa útbúgvið fólk, og hetta kann fáa ringa ávirkan á føroyska luttøku í oljuvinnuni.

Nú tekur felagið hjá maskinmeistarunum til orðanna, og nevndin tekur fult undir við orðunum hjá Vinnuhúsinum. Í tíðindaskrivi frá felagnum verður sagt, at tað er ein sannroynd, at tørvurin á maskinmeistarum innan fiskivinnuna longu nú er so stórur, at hann kann ikki nøktast sum er.

- Hetta førir við sær, at trýstið á myndugleikarnar, at geva undantaksloyvið, er sera stórt. Tíverri vera loyvini útskrivaði hóast felagið mælir harðliga frá hesum. Orsøkin er tann einfalda, at teir persónarnir, sum fáa undantaksloyvini als ikki hava ta útbúgving, sum krevst til starvið. Hetta kann seta trygdina umborð í vanda, sigur Maskinmeistarafelagið.

Sambært felagnum, so eru orsøkirnar til at so fá nema sær maskinmeistaraútbúgving, at tað eru so fá læruypláss og at áhugin fyri teknisku fakunum er ov lítil. Felagið staðfestir, at upplýsingin um sjálva útbúgvingina kundi verið betur og eisini, at meira átti at verið gjørt við at greiða frá teimum fjølbroyttu arbeiðsmøguleikunum, sum útbúgvingin gevur.

- Maskinmeistaraútbúgvingin er á einum slíkum stigi, at hon gevur stórar møguleikar fyri spennandi arbeiði við góðum treytum. At stórur tørvur er á maskinmeistarum, átti at havt við sær, at tað skuldi verið nóg mikið av arbeiði eina góða tíð fram, sigur felagið.

Sambært upplýsingum frá systurfelagnum í Danmark, hava fólk við maskinmeistaraútbúgving ikki bara motorar sum starvsøki. Fleiri teirra eru stjórar, deildarleiðarar ella rakstrarleiðarar og starvast innan orku, orkuráðgeving, framleiðslu, sølu, tænastuveiting, ígongdseting og viðlíkahald. Umframt tað, finnast eisini maskinmeistarar, sum starvast innan tekniska ráðgeving, undirvísing og gransking.

- Orsøkin til at tey fáu, sum hava maskinmeistaraútbúgving, tíðum velja sær starv uttanlands heldur enn í Føroyum er, at tær treytir, sum standa teimum í boði, eru munandi betri, enn tær eru her á landi. Í hesum føri verður hugsað um lønarviðurskifti, frítíð, skatt og arbeiðsumhvørvi. Men hetta eru samstundis viðurskiftið, sum vinnulívið og myndugleikar eiga at taka til eftirtektar, skrivar felagið.

- Tað er givið, at vit, sum føroyingar vilja strekkja okkum nokk so langt fyri at fáa arbeiði í Føroyum, men um fáu maskinmeistararnir, sum fáa útbúgving her á landi, skulu vera verandi, og teir, sum longu eru í starvi uttanlands, skulu fáast heimaftur at arbeiða, so mugu viðurskiftini, sum nevnd eru omanfyri fáast í rættlag, skrivar felagið í tíðindaskrivinum.

Annars kunnu vit at enda skoyta upp í, at Maskinmeistarafelagið nú eisini er at finna á internetinum. Heimasíðan eitur www.mf.fo og har ber til at finna stórt sæð allar praktiskar upplýsingar sum viðkoma maskinmeistarum.

## Sosialurin og Dimmalætting samstarva um prenting

Eirikur Lindenskov

Seinastu mánaðirnar hava samráðingar verið millum Dimmalætting og Sosialin um prentsamstarv. Úrslitið var greitt mánadagin, tá Dimmalætting og Sosialurin stovnaðu nýtt partafelag, sum fyribils er nevnt p/f Prentmiðstøðin, sum skal prenta Dimmalætting og Sosialin umfram onnur bløð.

Við hesum verða báðar blaðprentsmiðjurnar í landinum lagdar saman, og heldur nýggja felagið til í hølum hjá Dimmalætting við Smyrilsvegin á Hálsi í Havn.

Sum lesarar okkara hava lagt til merkis, verður Sosialurin nú partvíst prentaður í litum. Í framtíðini verða eisini aðrar broytingar gjørdar við Sosialinum, sum vit fara at hoyra meira um seinni.

